## NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Tjarnargarður við Hoyvíksvegin:

# Vaktarskifti á gomlu marinustøðini



*Jan Christiansen, borgarstjóri handar leiðaranum av Tjarnargarði, Hensiu Einarsson, ein málning av Zacharias Heinesen sum gávu frá býráðnum*

**Hósdagin 21. oktober var almenn móttøka á Tjarnargarði við Hoyvíksvegin í Havn í sambandi við at eldraíbúðirnar eru lidnar. Tjarnargarður er fyrrverandi Marinustøðin, sum Tórshavnar býrðað hevur keypt og innrættað til eldraíbúðir**

MÓTTØKA
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Gott 200 fólk vóru savnaði á Tjarnargarði hósdagin 21. oktober, tá almenn móttøka var á Tjarnargarði í sambandi við at eldraíbúðirnar vóru lidnar.

Røður vórðu hildnar av Jan Christiansen, borgarstjóra, Beatu L. Samuelsen, formanni í sosialu nevnd hjá býráðnum, og Hensiu Einarsson, leiðara á Tjarnargarði. Eisini var sangframførsla av Sannu í Brekkunum.

Jan Christiansen segði m.a., at tað var honum ein stór gleði at vera við til hátíðarløtuna, nú eldraíbúðirnar á Tjarnargarði eru lidnar. Tað er eisini at gleðast um, at Tjarnargarður fer at hava dagheim til minnisveik.

At Tjarnargarður eisini fer at hava tilboð um fyribyrgjandi venjingar við fysio- og ergoterapi fer at gera, at tey gomlu kunnu varðveita førleikan longri og harvið hava eina betri lívsgóðsku. Tað minkar eisini um tørvin á røktarheimsplássum.

Hensia Einarsson segði m.a. at tað er eitt privilegium at vera leiðari á Tjarnargarði. Karmarnir eru framúr góðir og starvsfólkið sera motiverað.

Stovnurin skal hýsa ymiskum virksemi, og enn er bert fyrsti parturin komin í gongd, nevniliga búparturin við 10 búfólkum.

Tjarnargarður hevur nógvar áhugaverdar grannar, m. a. Adventistaskúlan og ein barnagarð beint yvirav. Tað er so upplagt at fáa samstarv í lag við hesar stovnar. Tað er mín vón, at Tjarnargarður verður eitt livandi stað, har generatiónirnar koma saman til gleði og gagn fyri øll.

Eisini hevði Hensia eina heilsan til umboðini fyri Færøernes Kommando. "Tak for at I solgte Marinestationen til Torshavns kommune. Da jeg var ung, følte jeg mig velkommen på Marinestationen, lidet anende, at vi nu kan gøre gengæld. Skulle I få brug for de tjenster, vi yder her på stedet, er I selvfølgelig velkomne".



*Vaktarskifti á gomlu marinustøðini. Umboð fyri Færøernes Kommando saman við starvsfólkunum á Tjarnargarði*



*Umboð fyri Færøenes Kommando vitjaðu sítt fyrrverandi arbeiðspláss*



*Kartni Winther vitjar konuna, Dagmar, sum er eitt av búfólkunum á Tjarnargarði*



# Bókarøðin um alis-og evnafrøði liðug

**Í samband við, at bókarøðin, Alis-og evnafrøði 1 til 3, nú er liðug, varð skipað fyri framløgu av bókaverkinum í Mentamálaráðnum hósdagin, har Føroya Skúlabókagrunnur legði allar bøkurnar fram**

FRAMLØGA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var landsstýrismaðurin í mentamálum, Jógvan á Lakjuni, sum legði fyri hendan dagin.

Niels Petersen, sum hevur verið við í øllum hesum arbeiði og Helena D. á Neystabø, greiddu vegna Skúlabókagrunnin frá bókaútgávuni.

Høvundurin, sum hevur skrivað snotuligu og dygdargóðu verkini, Pól Jespersen, hevði eisini eina hugnaliga frágreiðing um sín viðfødda áhuga fyri alis-og evnafrøði.

Hann greiddi frá tíðini sum smádrongur, tá ið hann royndi eitt sindur av hvørjum innan alis-og evnafrøðina.

Báður Niclasen, sum starvast á Náttúruvísindadeildini, segði eisini nøkur orð um týdningin av alis-og evnafrøðini í breiðari merking.

Lærarin í alis-og evnafrøði, Jacob Thomsen, sum hevur starvast við Tórshavnar kommunuskúla í meira enn eina fjórðings øld, hevði tveir næmingar við til framløguna, har hesir gjørdu nakrar royndir úr tilfarinum.

Sosialurin fer týsdagin at venda aftur til ymiskt av tí, sum sagt varð við framløguna í Mentamálaráðnum.

Fráliki teknarin, Óli Petersen, sum saman við Janusi Dam Guttesen hevur verið við til at ríkað verkini við tekningum, var eisini við hendan dagin.

## Heimligt umhvørvi

Bókarøðin, Alis-og evnafrøði 1 til 3, er ætlað næmingum, sum ganga í 7. flokki og í framhaldsdeildini.

Triðja og seinasta verkið, sum nú er komið, er ætlað næmingum í 9. flokki.

Umframt tríggjar grundbøkur, eru eisini tríggjar uppgávubøkur og tríggjar lærarabøkur.

Eitt av endamálunum við bókarøðini er at geva næmingunum í fólkaskúlanum møguleika fyri at ogna sær vitan á hesum víðfevnda øki á móðurmálinum – og við støði í heimligum umhvørvi.

Tað er sum nevnt Pól Jespersen, studentaskúlalærari, sum hevur týtt og tillagað alla bókarøðina til føroysk viðurskifti.

Í sambandi við arbeiðið, hevur ein námsfrøðiligur stuðulsbólkur við lærarunum, Harriet Hansen, Selmar Jacobsen og Jacob Thomsen, viðgjørt handritið.

Rættlestrinum hevur Svenning Tausen tikið sær av.

## Tekningarnar

Grundbókin er prýdd við litføgrum og lýsandi myndum, sum Óli Petersen hevur teknað. Aftrat hesum eru fotomyndir úr umheiminum og eisini úr føroyska gerandislívinum.

Janus Dam Guttesen hevur prýtt arbeiðsbókina og lærarabókina við góðum og frágreiðandi tekningum til hvørja arbeiðsuppgávu.

ReproZ hevur staðið fyri umbrótingini av bókaverkinum, Alis-og evnafrøði 1 til 3.



*Niels Petersen, sum starvast á Føroya Skúlabókagrunni, hevur verið ein veldugur "primu-motorur", tá ið ræður um nýggjar skúlabøkur seinastu mongu árini*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Høvundurin, Pól Jespersen, studentaskúlalærari. Hansara áhugi fyri alis-og evnafrøði má sigast at vera viðføddur*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*



*Næmingar saman við læraranum, Jacobi Thomsen, ger royndir úr bókaverkinum*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Fundur um bygnaðar-broytingar á SEV

**Í gjár klokkan 10 skuldi stýrið fyri SEV hava fund um bygnaðarbroytingarnar, sum umboðsráðið samtykti í vár**

SEV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Tað var í vár, at umboðsráðið hjá SEV samtykti at fremja broytingar í viðtøkunum um bygnaðin hjá elfelagnum. Samtykt varð, at SEV í staðin fyri at hava sjey deildarleiðarar, nú skal hava tríggjar deildarstjórar.

Á fundi fríggjamorgunin klokkan 10 fór stýrið fyri SEV undir at viðgera málið, og ætlanin var at taka støðu til bygnaðarbroytingarnar.

Undan fundinum í gjáramorgunin vildi stjórin í SEV, Klæmint Weihe, ikki siga, hvørjir deildarstjórarnir verða, men hann upplýsti, at teir tríggir skulu taka sær av fyrisiting, framleiðslu og býtisvirkjum, sum tað verður rópt.

Í hesum seinasta liggur, at deildarstjórin eitt nú fer at hava ábyrgdina av linjunum hjá SEV og tí partinum, sum liggur uttanfyri elverkið.

## Trý nøvn

Klæmint Weihe sigur, at almenningurin verður kunnaður um, hvørjir deildarstjórarnir verða, tá ið stýrið hevur viðgjørt og tikið støðu til bygnaðarbroytingarnar.

Sosialurin hevur skilt, at teir, sum eru uppá tal til deildarstjórastørvini hjá SEV, eru John P. Danielsen, sum verður fíggjarstjóri, Bjarki Hermansen, sum verður rakstrarstjóri og Finn Jakobsen, sum kemur at taka sær av býtisvirkjum.

Klæmint Weihe sigur, at teir, sum ætlandi verða settir í hesi størv, ikki hava fingið tað at vitað enn.

– Fyrr enn stýrisfundurin er lokin, vita vit ikki, hvat úrslitið verður, sigur hann.



*– Fyrr enn stýrisfundurin er lokin, vita vit ikki, hvat úrslitið verður, segði stjórin í SEV, Klæmint Weihe, undan fundinum í gjáramorgunin*